# Ríkisrættarligu viðurskiftini skulu avgreiðast

**Nú vilja vit í samgongu og sum fyrsta mál á skránni avgreiða tey ríkisrættarligu viðurskiftini, sigur Marjus Dam, sum er afturvaldur løgtingsmaður í Vágum. Hann sigur eisini, at nú er nóg mikið tosað um almannamál. Nú skal handlast**

LØGTINGSVAL
*Edvard Joensen*

**Miðvágur:** Sambandsflokkurin eigur nú at sleppa í samgongu. Og sum fyrsta mál á skránni vónar vágatingmaðurin hjá flokkinum, at ríkisrættarligu viðurskiftini við Danmark verða avgreidd.

Broytingar í støðu Føroya mótvegis Danmark eiga at verða gjørdar, sigur Marjus Dam, men tær skulu vera innan fyri karmarnar á ríkisfelagsskapinum.

Marjus Dam eftirlýsir friði og góðum samstarvi við hinar partarnar av ríkinum, so vit sleppa undan hesum róparínum eftir hvørjum øðrum, sum verið hevur ov nógv av seinastu árini, sum hann tekur til.

– Vit skulu hava eitt gott samstarv við Danmark og ikki hetta niðurbrótandi keglið, sum verið hevur seinastu fýra árini, sigur hann.

## Almannamál

Tíðin er komin til at fáa nøkur ting upp á pláss, sum hava ligið á láni seinastu árini, vísir Marjus Dam á.

– Vit hava upplivað, at Landssjúkrahúsið varð læst niður, tá kreppan byrjaði, og deildir, sum vórðu afturlatnar orsakað av kreppuni, eru framvegis læstar niður.

Úrslitið av hesum eru alt ov langir bíðilistar. Vit mugu fá stytt hesar, og fáa latið deildir uppaftur.

Eitt annað, sum nógv hevur verið frammi í valstríðnum, er eldraøkið, vísir Marjus Dam á í samrøðu við Sosialin valkvøldið.

Hann sigur, at hetta økið er ikki bara nakað, sum vit skulu tosa um. Tað skal gerast nakað ítøkiligt við tað, staðfestir hann.

Nú lættar av ymsum slagi eru givnir til partar av vinnuni, og bøtt er um pensiónirnar, sum pensionistunum er væl unt, er eisini tíð upp á, at tann vanliga familjan fær sín part, sigur Marjus Dam. Tað eiga vit nú at prioritera, sigur hann.

## Lokalmál

Flogvøllurin er hjartamál hjá rættiliga nógvum vágafólki, og tað málið liggur eisini frammarlaga há løgtingsmaninum hjá Sambandsflokkinum í Vágum.

Marjus Dam sigur, at hann ynskir eina avtalu við danir, sum umsita flogvøllin, soleiðis at vøllurin kann verða longdur, terminalurin útbygdur, og parkeringsøkini rundan um vøllin verða gjørd soleiðis, at tey kunnu taka í móti øktu ferðsluni, sum væntandi er, nú undirsjóvartunnilin nakað skjótt verður latin upp.

Júst undirsjóvartunnilin er annað stórmál, sum liggur Marjusi Dam frammarlaga í huga.

– Tað er av alstórum týdningi fyri øll, sum skulu brúka tað sambandið, at bummgjaldið verður so lágt sum gjørligt. Serliga hjá teimum, sum skulu brúka tað nógv, sigur hann.



*Nú er tíð upp á at fáa eina nýggja samgongu, sum kann avgreiða ríkisrættarligu viðurskiftini innan fyri ríkisfelagsskapin, sigur Marjus Dam, sum varð afturvaldur fyri Sambandsflokkin í Vágum*

## Samgonga

Marjus Dam er heldur varin sjált valkvøldið við at úttala seg nakað um samgongumøguleikar eftir valið.

Úrslitið gjørdist so mikið ógreitt, at tá avtornaði, høvdu bæði samgonga og andstøða sama tingmannatal, hóast andstøðan hevði eini tvey prosent fleiri atkvøður og eisini størsta flokkin, sum er Sambandsflokkurin.

– Eg veit ikki, hvat Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin kunnu finna uppá, sigur Marjus Dam. Men eg vildi ynskt, at lagt varð á annan bógv, og hendan samgongan varð skift út.

– Vit kunnu ikki halda fram við hesi kósini, vit hava nú, tí tá verður tann framburður, sum verið hevur í Føroyum seinastu nógvu árini, skerdur nógv, og tað haldi eg ikki, at vit sum politikarar kunnu standa model til.

– Tí haldi eg, at vit eiga at leggja á annan bógv og ikki vera so bastant og fundamentalistisk í loysingarynskjum, at vælferðin rýkur upp á tað, heldur Marjus Dam, afturvaldur sambandstingmaður í Vágum.

Upp á spurningin, um hann vil hava eina heilt nýggja samgongu, svarar Marjus Dam stutt og greitt:

»Absolutt«.

# Fáar flokkar í samgongu



*Ein fýraflokkar samgonga tiltalar meg als ikki, sigur Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, sum vil bíða eftir, hvat úrslit Anfinn Kallsberg fær burtur úr einum samráðingarumfari*

**Jørgen Niclasen, sum varð afturvaldur fyri Fólkaflokkin í Vágum, er einki heitur fyri fýraflokka samgongu. Hann væntar, at tað verður ov trupult at arbeiða á einum so breiðum grundarlagi**

LØGTINGSVAL
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Ein fýraflokka samgonga er ov breitt grundarlag til at fáa nakað gott samstarv á, metir Jørgen Niclasen, sum varð afturvaldur fyri Fólkaflokkin í Vágum.

Jørgen Niclasen sigur, at hann fyri fyrst bíðar eftir løgmanni. Løgmaður hevur samráðingarrættin í løtuni, og Jørgen Niclasen metir eisini, at tað er rætt, at løgmaður byrjar samráðingar um eina nýggja samgongu.

– Vit mugu so bara ásanna, at samgongan hevur mist meirilutan, sigur Jørgen Niclasen. Hinvegin meti eg ikki, at vit hava fingið nakra markanta útmelding um, at fólkið vil so ella so, tí býtið er so javnt millum samgongu og andstøðu, sigur hann.

Jørgen Niclasen metir tó, at komandi fýra árini verður einki stórvegis burtur úr nakrari fullveldisgongd soleiðis. Tað metir hann seg hava fingið burtur úr úrslitinum av løgtingsvalinum, sigur hann.

Tað eru komnar ymsar útmeldingar undan valinum, og summar hava eisini verið rímiliga spískar, vísir Jørgen Niclasen á. Men nú byrjar gerandisdagurin aftur, og nú skulu flokkarnir so gera upp við seg sjálvar, hvat teir vilja og ætla.

Hóast Jørgen Niclasen letur skilja, at hann ikki metir tað sum nakra góða loysn at halda fram við verandi samgongu og einum flokki afturat, er hann kortini rættiliga varin við at koma einum boði upp á nakra aðra samanseting.



UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## Vánalig trygd

Norska oljumálastýrið er hvassorðað í einari frágreiðing um tilburðin, tá ein 44 ára gamal maður doyði umborð á boripallinum Byford Dolphin tann 17. apríl.

Statoil er operatørur á leiðini, men pallurin boraði fyri Esso, og bæði feløgini fáa hvassar ábreiðslur frá oljumálastýrinum. Sagt verður, at arbeiðið á pallinum var alt ov illa skipað, alt ov nógv órudd var á arbeiðsøkinum, og samskiftið var alt ov vánaligt.

Statoil vil ikki gera nakrar viðmerkingar til tað hvassorðaða ummælið, fyrr enn felagið hevur kannað frágreiðingina hjá oljumálastýrinum nærri.

## Týskt verkfall

Metalarbeiðsmenninir í trimum týskum statum avgjørdu týsdagin at fara í verkfall, eftir at einki kom burtur úr samráðingunum um nýggjan sáttmála.

Fakfelagið IG Metall segði, at meiri enn 80 prosent av felagsins limum í Berlin, Brandenburg og Baden-Wúrtenberg høvdu atkvøtt fyri at fara í verkfall, og verkfallið er sostatt tað størsta í Týsklandi síðani 1995.

Seinastu tíðina hava ábendingar verið um, at tað var farið at ganga framá í týska búskapinum, men nú bera eygleiðarar ótta fyri, at verkfallið hjá metalarbeiðsmonnunum fer at seinka framgongdini ella at steðga henni, um illa vil til.

Danska vinnulívið hevði annars væntað sær nógv av búskaparframgongdini í Týsklandi. Herfyri boðaði Handverksráðið frá, at útlit vóru fyri veksandi donskum útflutningi til Týsklands, men danskar fyritøkur, sum plaga at selja vørur suður um markið, siga nú, at fleiri teirra hava selt minni nú enn frammanundan. Fyritøkur, sum fyrr plagdu at senda 60 prosent av sínum vørum til Týsklands, siga, at týski parturin er bara umleið 25 prosent nú.

# Le Pen ávarar Zidane

**Høgrasinnaða forsetavalevnið í Fraklandi, Jean-Marie Le Pen, ávarar nú tann kenda fótbóltsspælaran Zinedine Zidane ímóti at leggja seg út í valið.**

FRAKLAND
*Árni Joensen*

Tað var mánadagin, at tann kenda franska fótbóltsstjørnan Zenidine Zidane segði, at sjónarmiðini hjá Jean-Marie Le Pen og flokki hansara Front National umboða ikki tey veruligu fronsku virðini.

- Hevði hann verið her, hevði eg sagt við hann, at at hetta er ikki nakað, sum hann eigur at leggja seg útí. Tú letur teg stýra av teimum, sum nýta teg til frama fyri síni egnu sjónarmið. Zidane er ikki nakað serstakt. Hann er ikki annað enn ein púra vanligur borgari, segði Le Pen við eina franska útvarpsstøð týsdagin.

Úr París verður sagt, at tann 73 ára gamli Le Pen hevur ongantíð verið serliga hugtikin av franska fótbóltslandsliðnum. Í 1996 fanst hann at liðnum. Hann segði, at nógvir av leikarunum eru ikki fransmenn, og at summir teirra hvørki duga ella vilja syngja franska tjóðsangin.

Zenidine Zidane er hálvur fransmaður. Pápi hansara er úr Algeria.



*Zenidine Zidane eigur ikki at leggja seg út í franska forsetavalið, sigur Jean-Marie Le Pen*
*Mynd: Reuters*

# ST umhugsar at sleppa kanningini í Jenin

**ST-aðalskrivarin Kofi Annan umhugsar at sleppa ST-kravinum um at kanna, hvat hendi í palestinsku flóttafólkaleguni Jenin undir ísraelsku hersetingini. Orsøkin er, at Ísrael leggur forðingar í vegin.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Síðani trygdarráðið hjá ST samtykti at lata eina nevnd kanna, hvat veruliga fór fram, tá ísraelski herurin hersetti palestinsku flóttafólkaleguna Jenin, er ísraelska stjórnin komin við fleiri viðmerkingum og krøvum. Tað hevur havt við sær, at nevndarlimirnir hava sitið í Geneve í Sveits og bíðað eftir boðum um at fara avstað. Tað eru nú fjúrtan dagar, síðani ST tilnevndi limirnar í nevndini, sum skal kanna palestinsku pástandirnar um, at ísraelski herurin framdi hópmorð í Jenin.

ST-varaaðalskrivarin í politiskum viðurskiftum, Kirsten Predergast, segði t″skvøldið, at tá ísraelska stjórnin ger alt fyri at draga kanningararbeiðið út, umhugsar Kofi Annan at lata nevndarlimirnar fara heimaftur og at upploysa nevndina.

Sjálvur segði Kofi Annan týsdagin, at ST hevur gjørt tað, sum gerast kann, fyri at ganga teimum ísraelsku krøvunum á møti. Hetta segði hann, beint eftir at ísraelska stjórnin enn einaferð hevði boðað frá, at hon fer ikki at samstarva við kanningarnevndina. Sambært ísraelska útvarpinum segði stjórnin, at ST hevur ikki eftirlíkað krøvum hennara.

Tá ST tilnevndi ta upprunaligu nevndina, kravdi Ísrael, at eitt umboð fyri amerikanska hervaldið skuldi vera í nevndini, og ST gjørdi tí av at tilnevna amerikanska generalin William Nash sum nevndarlim. Men tað hevur eftir øllum at døma ikki verið nóg mikið, tí seinni hava talsmenn hjá ísraelsku stjórnini sagt, at nevndin er anti-ísraelsk.

Úr Norðurlondum:

## Skal kannast

Norska stjórnin hevur gjørt av at kanna, hvussu tann stóra fíggjarliga hjálpin til umheimin verður umsitin. Ætlanin er bæði at kanna, hvussu uttanríkisráðið umsitur hjálpina, hvussu menningarstovnurin NORAD ger, og luturin hjá teimum norsku sendistovunum í menningararbeiðinum skal eisini kannast.

Menningarráðharrin Hilda Frafjord Johnson sigur, at tað er neyðugt at kanna viðurskiftini, so stjórnin kann fáa vissu fyri, at hjálpin veruliga fer til teirra, sum hava tørv á henni. Hon vísir á, at endamálið við norsku menningarhjálpini er í fyrsta lagi at stríðast ímóti fátækradømi kring heimin.

Noreg er eitt av teimum londunum, sum hevur sýtt fyri at kvetta menningarsamstarvið við Zimbabwe, og menningarráðharrin segði týsdagin, at støðan er ikki broytt.

## Meiri ferð

Danir, sum koyra á motorvegunum, sleppa nú at koyra skjótari, men tó ikki allastaðni. Stjórnarflokkarnir hava verið ósamdir um at seta hámarksferðina upp, men í vikuni samdust teir um, at tað skal verða loyvt at koyra 130 kilometrar um tíman á trimum vegastrekkjum í Jútlandi. Hini vegastrekkini eru ikki egnað til meiri ferð enn nú, halda politikararnir.

## Í so forvitin

Ein lensmaður í Nord-Trøndelag í Noregi er fyribils koyrdur úr starvinum. Løgregluovastin í landspartinum sigur, at lensmaðurin er koyrdur til hús, tí tað er avdúkað, at hann hevði lúrt inn ígjøgnum kamarsvindeygað hjá einum hjúnum. Tað er brot á tænastumannalógina. Tí er lensmaðurin koyrdur til hús, og hann skal eisini rinda 10.000 krónur í bót.